## Grækarismessu-hald á Bugnum

Grækarismessudag kl. 15.00 skipa skótarnir í Fuglafirði fyri grækarismessuhaldi á torginum við Mentunarhúsið í Fuglafirði.

Byrjað verður við skrúðgongu frá skótahúsinum. Hendan byrjar kl. 14.50, og verður so gingið oman til Mentanarhúsið, har Fuglafjarðar Hornorkestur fer at spæla. Petur Páll Mikkelsen fer at halda grækarismessurøðuna, og seinni verður opið í Skótahúsinum.

**-jm**

## Skótalív og køkutombola í SMS

SKÓTALÍV
*Tíðindaskriv*

Í hesum døgum hava gulu skótarnir í Havn eitt stórt tiltak í SMS fyri børn og vaksin. Endamálið er at sýna skótavirksemið fram og at fáa inn eitt sindur av peningi til virksemið.

Til undirhalds er leguøki, har skótar telgja og gera ymiskt annað, klatriveggur og rutsjibani er eisini, umframt mattombola við fjølbroyttum vinningum og vanligt tombola. Eins og undanfarnu árini skipa skótarnir eisini fyri eini framsýning við myndum frá skótaarbeiðinum upp gjøgnum tíðirnar. Her kunnu gamlir skótar kunnu minna seg aftur á skótalívið, sum tað var fyri 20-30 árum síðan og longur aftur. Til hesa framsýningina eru nógv nýtt myndatilfar fingið til vega frá gomlum skótum. Væl umtókta sjónvarpssendirøðin "Patruljan" verður eisini víst á stórskíggja.

Tiltakið hjá skótunum er opið hósdag, fríggjadag og leygardag somu tíðir, sum handlarnir í SMS hava opið.

Ágóðin frá tiltakinum fer til arbeiðið hjá Skótaliði Sigmunds Brestissonar.

## Støkk fyrireikar seg til framsýning

**Runavík:** Vikuskiftið 19. og 20. mars hevur Støkk árliga fimleikaframsýning í ítróttarhøllini í Runavík.

Eins og undanfarin ár hevur felagið nógvan fjølbroyttan fimleik at vísa fram, m.a. móður og barn, børn 5-6 ár, vanligu liðini frá 1-10 flokk, ungar kvinnur, aerobic, reiðskapslið, stór-kappingarlið og blandað lið við kvinnum og monnum.

**sb.**

## Fýra grindaformenn valdir

**Klaksvík:** Á býráðsfundi í farnu viku var val av grindaformonnum og varamonnum eitt av málunum á skránni.

Eftir tilmæli frá Ví frá Sýslumanninum í Norðoyggjum, samtykti býráðið at velja fýra grindaformenn og tveir varamenn.

Grindaformenn í dag eru sostatt: Knút Olsen, Lias í Vági, Óla Karl Olsen og Andras Joensen.

Varamenn hjá grindaformonnunum eru: Bjarti Højbro og Páll Steinberg.

**sb.**

## Samantvinnað tiltak fyri menn og kvinnur

**Havn:** Hjá fleiri samkomum hevur verið vanligt við serstøkum stevnum fyri kvinnur og serstøkum stevnum fyri menn.

Men í Evangeliihúsinum í Havn ætla tey nú at gera tað øðrvísi. Fyrsta vikuskiftið í apríl mánaði skipar Evangeliihúsið nevniliga fyri eini kombineraðari kvinnu- og mansstevnu.

Á hesi stevnuni fær samkoman vitjan úr Danmark, tí avtala er gjørd við hjúnini Lene & Andreas Jørgensen úr Odense um at undirvísa.

**sb.**

## Nú fáa norðoyingar møguleikan

**Klaksvík:** Hesar seinastu dagarnar hevur Javni skipað fyri fleiri fundum kring landið við heitinum "Tú kanst – bara tú fært møguleikan".

Fundirnir hava til endamáls m.a. at lýsa møguleikarnar hjá fólki við menningartarni, og verða teir skipaðir við fyrilestri, kjaki og spurningum.

Higartil hava hesir fundirnir verið í Sørvági, Kambsdali, Vági og í Havn. Og týskvøldið í næstu viku eiga so klaksvíkingar tørn, tá ein líknandi fundur verður hildin á bókasavninum í Klaksvík.

**sb.**



*- Vit hava gingið í skúla hvønn morgun og hava bert av sunnan mat við í matpakkanum, siga Rasmus og Anita.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# – Tað besta er at spæla úti

**Hesa vikuna hevur verið skipað fyri eini heilsuviku í Hoyvíkar skúla fyri næmingum úr 1.-7. flokki**

HEILSA
*Annika Isfeldt og Guðrun Jacobsen*

Heilsuvikan snýr seg um at gera næmingarnir tilvitaðir um heilsu, hvussu kroppurin virkar, sunnan og ósunnan mat og hvussu man fær tað gott við seg sjálvan.

Vikan hevur verið býtt upp í ymisk evnir, sum øll hava okkurt við heilsu at gera.

Hvør dagur byrjar við einum fyrilestri, ið snýr seg um dagsins evni. Og seinni verður skipað fyri ymiskum tiltøkum, ið hava við heilsu at gera, so sum renning, ymiskur ítróttur, og filmar um heilsu sum heild.

### Týdningarmikið at røra seg

- Vit heittu á foreldrini, um at lata børnini ganga til og úr skúla. Eg haldi, at tey flestu hava gingið høgt uppí tað, sigur Birgit Arge, skúlastjóri í Hoyvíkar skúla. Hvønn dag, tá eg komi til arbeiðis, síggi eg streymar av børnum ganga eftir gøtuni.

- Fólk kunnu blíva sjúk av at eta skeivt og røra seg ov lítið. Vit hava leingi hildið, at hetta var eitt týdningarmikið evni at kunna børnini um. Vit halda, at tað er neyðugt, tí at hetta er eitt evni, sum er nógv uppi í tíðini. Serliga í øðrum londum er hetta ein trupulleiki, og vit vilja ikki, at tað skal blíva ein líka stórur trupulleiki í Føroyum.

- Vit hava við hjálp frá børnunum pyntað skúlan við plansjum av mati og tílíkum. Og eg meti, at børnunum dáma tað væl. Tey halda, at tað er deiligt við eitt sindur øðrvísi undirvísing, heldur Birgit.

### Burdi verið aftur

Vit hava lært at eta sunt og ikki ov nógv av sukuri, tí so kann man fáa sukursjúku. Man skal eisini minnast til at drekka nógva mjólk, siga 11 ára gomlu Rasmus og Anita, sum bæði eru næmingar úr Hoyvíkar skúla.

Tey eru bæði á einum máli um, at ein tílík evnisvika burdi verið aftur.

- Vit hava eisini lært um kroppin, um kyknir og um kálk. Vikan hevur eisini verið øðrvísi av tí, at vit hava gingið í skúla hvønn morgin og hava bert havt sunnan mat við í matpakkanum.

Vit hava m.a. gjørt fimleik, runnið, og hugt eftir filmi, men tað besta hevur avgjørt verið, tá ið vit hava spælt úti, siga tey at enda.

# Grækarismessuhald í Havn

GRÆKARISMESSA

Leygardagin, grækarismessudag, verður Grækarismessuhald á Vaglinum. Skótarnir ganga skrúðgongu, Havnar hornorkestur spælir, og Havnarkórið syngur.

Lis Mortensen flytur fram røðu.

Fyrsta Grækarismessan var hildin í 1943, og var tað Sverri Paturson sum heitti á skótarnar um at halda henda dagin. Allir skótar í Havnini skulu møta ein tíma áðrenn í skótahølum sínum.

Skrúðgongan ferð frá Vágsbotni kl.14.45.

Gingið verður eftir Bøgøtu-Tróndargøtu-Niels Finsensgøta-oman á Vaglið. sigur Skótalið Sigmunds Brestissonar í tíðindaskrivi.

# »Løkjukafé'in« - eitt tilboð til sinnisveik

**Stuðulsskipanin fyri vaksin fer undir nýtt tiltak, nevnt »Løkjukaféin«. Løkjukaféin heldur til í húsunum hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin í Løkjatúni 1 á Argjum**

ÍTRIV
*Tíðindaskriv*

Endamálið við Løkjukaféini er at geva sinnisveikum møguleikar og umstøður at savnast til fjølbroytta samveru í hugnaligum umhvørvi. Vit ætla at leggja stóran dent á, at brúkararnir sjálvir eru við at mynda kaféina.

Á Løkjukaféini er møguleikin fyri at keypa sær ein drekkamunn við onkrum góðum afturvið. Eisini er møguleiki fyri at lesa bløðini og spæla ymsik spøl s.s. kortspæl og talv og annað ítriv.

Skipað verður eisini fyri ymiskum tiltøkum s.s. sangløtum, frásagnum, upplestri, útferðum, kjakfundum.

Tað er ikki nakað krav, at brúkarin skal luttaka í tiltøkumum fyri at gera brúk av kaféini, hann er vælkomin bara at støkka inn á gólvið.

Kaféin liggur javnt við veghæddina uttanfyri, hølini eru gjørd soleiðis, at tað eisini er atkomuligt hjá rørslutarnaðum gestum.

Kaféin eru opin mánadag til hósdag millum kl. 11.30 og 15.00.

Í samband við fyrsta upplatingardag 14. mars verður skipað fyri hugnaløtu frá kl. 12.30 til kl. 15.00. Løkjukaféin bjóðar kaffi og lagkøku, siga tey í Løkjukafé'ini í tíðindaskrivi - og heilsa. at øll eru vælkomin.